Øssur Mohr í Listaskálanum:

# Málningar, ið ikki kunnu málast



*Í hugaheiminum hjá Øssuri spøkir Leirvíksfjall meir sum okkurt dragandi og gandakent, enn sum eitt fjall*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Onkusvegna kom tað ikki óvart á, at Øssur Mohr skuldi finna eitt heiti fyri Listastevnu-framsýningina, sum ikki letur seg umseta. Hansara málningar eru royndir at fanga tað, sum ikki kann fangast. Málningar, har tú ansar tær fyri at blunka, tí kanska eru teir hvorvnir, tá tú hyggur aftur ...**

LISTASTEVNU-FRAMSÝNINGIN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

*Hugsa*
*teg væl um*
*áðrenn*
*tú sært hetta landslagið*
*bert einaferð*

– Visti tú, at tað finst onki danskt orð fyri Glottar?, spyr Øssur og rættir mær Listabókina Glottar, sum er útgivin í sambandi við framsýningina. Allur teksturin í bókini, yrkingarnar hjá Alexander Kristiansen og inngangurin hjá Frits Johannesen, er umsettur til danskt og enskt. Men altso ikki heitið "Glottar", sum Øssur ikki fann eitt nøktandi orð fyri á donskum.

Onkusvegna kemur tað ikki óvart á, at Øssur Mohr skuldi finna sær eitt heiti fyri framsýningina, sum ikki letur seg umseta. Hetta at royna at fanga tað, sum ikki kann fangast tykist at vera drívmegin aftanfyri hansara list og mátan, hann arbeiðir.

Tað, sum ikki eydnaðist í umsetingini, eydnast hinvegin í hansara málningum, og á framsýningini, sum letur upp í Listaskálanum fríggjadagin, fáa vit høvi at síggja úrslitini. Ella nøkur av teimum, tey, sum tað bar til at fanga, men sum eisini eru áminningar um, at tað altíð fara at finnast málingar, tað ikki ber til at mála.

## Gandaða fjallið

*Eisini fjallið*
*upploysist*
*og søkkur í øðrum litum*
*og broytir skap*
*innan í tær*
*...*
*áðrenn skitsan*
*er liðug*

Øssur er kendur fyri at mála Leirvíksfjall, sæð frá Fuglafirði, umaftur og umaftur. Men tað er ein misskiljing at halda, at Øssur stendur framman fyri vindeyganum og málar sítt útsýni.

– Leirvíksfjall spøkir í mínum hugaheimi, meir sum okkurt gandakent og dragandi, enn sum nakað fjall. Hevði eg skula mála eitt útsýni, hevði eg langt síðani verið liðugur.

Men alltíðina koma tað nýggir glottar rekandi, sum broyta skap og lit á fjallinum, fjørðinum, himmalinum og bygdini. Og hvørja ferð fær Øssur tilfar til ein nýggjan málning. Ein málning, sum gevur tær eina kenslu av, at um tú blunkar, er hann horvin, tá tú hyggur aftur.

Um hetta gandaða fjallið er eitt serligt Øssur Mohr eyðkenni má verða upp til áskoðaran at meta um, men sjálvur kennir Øssur seg ikki so bundnan av tí, sum onkur kanska heldur. Og tað undrar óiva mong, tá Øssur sigur, at hann væl kundi mála onkra aðrastaðni enn í Fuglafirði.

– Eg veit ikki rættiliga, hvat eg skal siga um alt hetta tosið um serlig listalig eyðkenni. Í eygunum hjá onkrum líkjast mínir málningar kanska nógv hvørjum øðrum, men eg standi ikki og gruni yvir, hvussu eg máli ella royni tilvita at dyrka eitt ávíst eyðkenni. Eg ivist í, um tað ber til, tí mínir málningar eru í grundini bara eitt framhald av mær sum menniskja, so tað fær neyvan verið øðrvísi, heldur Øssur.

## Tað ókenda

Tá Øssur byrjaði at mála, málaði hann fyri tað mesta persónar og hús, men persónarnir hvurvu skjótt. Húsini stóðu eftir, men tey vóru ikki longur hús við vindeygum og hurðum, tú kundi fara inn ígjøgnum.

– Eg kundi ivaleyst líka so væl slept húsunum heilt, men kanska eg ikki rættiliga eri til reiðar - enn. Men eg merki væl, at tað, sum liggur longri úti á fjørðinum og longri upp móti himmalinum er meir dragandi. Tað hevur okkurt óendaligt, næstan religiøst yvir sær ...

*Einaferð skal eg liva*
*í allar ævir*
*...*
*sum støv*
*skal eg einaferð liva*

Í teimum nýggjastu málningunum er tað týðiligt, at Øssur arbeiðir seg víðari, inn í málningin, inn í ein alsamt minni ítøkiligan heim. Sum kagar tú inn í ein ævintýrheim, sum ein danskur ummælari tók til. Bygdin í forgrundini, sum fyrr var grundarsteinurin, alt hvíldi á, er har enn, men mest sum bara ein lopfjøl inn í tað ókenda. Blái liturin er vorðin djúpri og meir ráðandi, aðrastaðni er hvíta ljósið vorðið sterkari. Vatnrætta fatanin av sjónarringinum er sett úr gildi, og inn ímillum hómast nú eitthvørt, ið ikki hevur verið har fyrr - líkist onkustaðni mest umhvarv av einum menniskja, sum kemur gangandi uppi millum skýggini.

- Eg veit ikki, um skuggarnir av andlitum og menniskjum er nakað eg havi málað tilvitað. Men eg bleiv eitt sindur skakkur, tá eg sá yrkingina hjá Alexandur, har hann sigur

*Tá ið tú gongur*
*eru beinini spurningar tínir*
*um dagin í morgin*

– Alexandur hevur ikki skrivað yrkingarnar til nakrar ávísar málningar, bara til málningarnar sum heild, men tað má vera okkurt við teimum, sum hevur manað fram hasa myndina í honum.

Kanska eru hesir málningarnir spurningar til, hvagar listarliga leiðin hjá mær gongur? Møguliga ...

## Onki kemur av ongum

Tá tað snýr seg um tað meir tekniska, hevur Øssur týðiliga lagt seg meir og meir eftir at skapa eitt samband millum tað tilfarsliga og tað listarliga.

Onki kemur av ongum, minnir Øssur á. Heldur ikki list. Tað skal helst síggjast ella í hvussu er hómast, at hansara málningar als ikki høvdu verið til uttan lørift, máling, pensil, spartil o.s.fr. Og tað ger onki, um lukturin av terpentin og olju hongur eitt sindur í luftini.

– Listarliga eri eg sera hugtikin av samanrenningini millum tilfarið og tað, sum málningurin roynir at siga. Men kanska eg við hesum eisini royni at koma við eini viðmerking til kjakið um, hvat list er fyri nakað. Ikki tí, eg haldi, at eg ella nakar annar finni eitt endaligt svar - tí tað svarið trúgvi eg ikki, er til.

Modernað hugskotslist, har tað listarliga liggur í sjálvum hugskotinum, sigur ikki Øssuri so nógv, tí í hansara verð er tað munur á einum listamálara og einum uppfinnara. Og tann munurin liggur millum annað í tí listarligu tilgongdini.

– Eftir mínum tykki, skalt tú helst síggja okkurt aftur av listafólkinum í listaverkinum. Tú skalt síggja, at persónurin, sum hevur skapað listaverkið, hevur arbeitt seg fram ímóti onkrum, hevur leitað eftir onkrum. Tað er jú hetta, sum millum annað gevur einum góðum málningi ein serligan dynamikk og eina orku, sum sæst, um tú tímir at hyggja. Men tú kanst altíð gera tað meir ítøkiligt, við at lata tað tilfarsliga renna saman við tí listarliga.

Hendan samanrenningin hevur fingið sítt heilt serliga úttrykk í málninginum "Aftaná regn", har málingin rennir í tunnum rípum niðureftir løriftinum, so at alt, himmalin, fjallið, fjørðurin og bygdin fara í upployssn og verða eitt, og í bókini Glottar renna saman við yrkingina hjá Alexandur

*Oman*
*úr erva*
*havið og ljósið*
*á glæ*
*dropin*
*ið datt*
*frammanundan*
*tá alt var*
*vatn*

## Kavi sæst best í kulda

Øssur hevur eina ørgrynnu av framsýningum aftanfyri seg, og í ár kann hann halda 10 ára dagin fyri sína fyrstu framsýning í 1994. Tað er týðiligt fyri okkum onnur, at nógv er hent síðani tá, men sjálvur heldur Øssur størstu broytingina vera henda, aftaná at hann gjørdist málari burturav fyri fýra árum síðani.

– Tað sigur seg sjálvt, at okkurt hendir, tá tú ikki longur bara málar í tíðini, sum leypir av, tá alt annað er fingið frá hondini. Sjálvur haldi eg meg mála meir heilhjarta nú, og trúgvi til dømis ikki, at eg nakrantíð aftur kundi mála ein málning lidnan út í eitt.

Øssur heldur eisini seg sjálvan hava fingið eina minni romantiska fatan av, hvat tað vil siga, at arbeiða sum listamálari. Hann er hildin uppat at ímynda sær sær, at tað finst nakar málningur, sum er lættur at mála, og sjálv arbeiðsgongdin er sjáldan so spontan, sum hann fegin vildi. Men íblásturin er tann sami - glottarnir, sum hvørva líka skjótt, sum teir komu, og hann málar framvegis best aftaná regnælið, meðan hann enn hevur dampin og luktin av jørðini í nasagluggunum. Kanska er tað sum Alexandur sigur at Kavi sæst best í kulda ...



*- Eftir mínum tykki, skalt tú helst síggja okkurt aftur av listafólkinum í listaverkinum. Tú skalt síggja, at persónurin, sum hevur skapað listaverkið, arbeiðir seg fram ímóti onkrum, leitar eftir onkrum, sigur Øssur Mohr*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Um Øssur Mohr

*Øssur Mohr får det hele med:*
*Rygraden i bygdernes huse*
*Et splitsekunds "glottar" (lysglimt) ude over fjorden*
*...*
*Forårsdagen, hvor farverne eksploderer ...*
*Fjeldenes totalt forskellige farveskalaer*
*Uvejrets rasen*
*Tågen, sim en sø hen over fjeldets marker*
*Vinterens snedækkede stormomsuste fjelde.*

Randi Ottosen, Kunstavisen

*Frummálið í myndunum hjá Øssuri er elligamalt. Tað eru teir glottar, sum fara um røkur og reyn á morgn, á middegi, um nón og út á kvøldið og seta sínar hælkoytur á fjallasíðurnar, fjørðin og húsini.*
*...*
*Myndirnar hjá Øssuri eru læstar inni í Fuglafirði - í einum frumhelli, sum hevur so nógv at geva, at tað er ótømiligt. Hann hevur vald á sínum myndum, men at fáa maktina yvir tí skiftandi ljósinum, sum er alla tíðina, kann bara gerast í glottum, sum reika um í myndum hansara, sum altíð hevur verið og fer at vera.*

Brot úr "Øssur og list hansara" hjá
Frits Johannesen í listabókini *Glottar*, 2004



NORÐURLANDAHÚSIÐ **TILTØK AUGUST 2004**

**SKRÁIN VIKA 32-33**

**Framsýningin "Veiðimentan" er á Etnografisk Museum í Stockholm til 23. september 2004**

**Tróndur Patusson framsýning í Müllers Pakkhús frá 6-15. august 2004.**

**Atlantic Music Event, konsert við Eivør Pálsdóttir, Gestir og Makrel í VEGA í Kbh. 28. august 2004**

**Fríggjadagur 06. august Listastevnan 2004**

**Leygardagur 07. august Listastevnan 2004**

**Sunnudagur 08. august Listastevnan 2004**

**Mánadagur 09. august Listastevnan 2004**

**Týsdagur 10. august Listastevnan 2004**

**Mikudagur 11. august Listastevnan 2004**

**Hósdagur 12. august Listastevnan 2004**

Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00

NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790
www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo